# 20 ár á Argjum

**Í dag eru liðin 20 ár síðani, at fyrsta eintakið av Sosialinum, sum varð prentað á Argjum, kom á gøtuna, leygardagin 6. mars 1982**

BLAÐSØGA
*Eirikur Lindenskov*

Dagin fyri, fríggjadagin tann 5. mars, flutti blaðið úr Sjúrðargøtu í Rabarbukvarterinum í Havn út í nýístandsettu húsini á Argjum.

Hetta var stór broyting fyri tey, sum starvaðust á Sosialinum. Fyri tað fyrsta var hetta fyrstu ferð, at tey fingu eini hús, ið vóru innrættað til endamálið, og so fekk blaðið aftur egna prentsmiðju.

Miðskeiðis í sjeytiárunum var gamla prentsmiðjan á Heygsbreyt løgd niður, og Sosialurin var árini fram til 1982 prentaður á á rotatiónspressuni hjá Dimmalætting.

Nýggja pressan hjá Sosialinum varð sett upp í kjallaranum á blaðhúsinum á Argjum, og hon hevur prentað Sosialin fram til summarið í 2000, tá nýggja felagið, sum Sosialurin og Dimmalætting eiga í felag, Prentmiðstøðin, varð stovnað. Hetta felag prentar í dag bæði bløðini og øll onnur bløð, sum verða prentað í Føroyum, tí hetta er einasta rotatiónspressa, sum er í landinum.

Hendan leygardagin fyri 20 árum síðani vórðu prentaðir 5.400 Sosialar. Blað kom tá út tvær ferðir um vikuna, men eftir 6. mars 1982 kom blaðið út tríggjar ferðir um vikuna. Seinast í áttatiárunum vaks útgávudagatalið til fimm ferðir um vikuna.

Ein vanligur leygardagssosialurin í dag verður prentaður í sløkum 8.000 eintøkum. Á Sosialinum starvast gott 30 starvsfólk. Av teimum eru trý, sum eisini starvaðust her í 1982: Jan Müller, sum tá var blaðmaður og nú er ábyrgdarblaðstjóri, Tummas Pauli Thomsen, sum er umbrótari, Sigrid Tróndarson, sum er umbrótari og Ann Christiansen, sum er á skrivstovuni. Í 1982 starvaðist eisini Árni Joensen, sum í dag skrivar útlendska tilfarið í blaðnum.

Tann 24. mai í ár eru 75 ár síðani, at Sosialurin kom út á fyrsta sinni.




## Jørgin Gunnarsson 50



Seinasta fríggjadag varð 50 ára føðingardagur hildin fyri 100 gestum í Bremnesi á norsku oynni Bømlo. Føðingardagsbarnið var havnarmaðurin Jørgin Gunnarsson.

Jørgin er føddur í Havn 1. mars 1952. Eftir skúlagongd í Havn og í Keypmannahavn flutti hann til USA, har hann starvaðist sum handilsskrivari á donsku sendistovuni í New York.

Í 1980 tók hann hægri handilsprógv á Føroya Handilsskúla og flutti síðan til Quebec í Kanada har hann var útgerðarmaður hjá føroyska rækjutrolaranum »Kristinu Logos«.

Í 1983 varð Jørgin settur skrivari hjá nevndini viðv. Fiskaaling, og síðan 1985 hevur hann selt Bridgestone aliringar og aðra aliútgerð í stórum parti av heiminum.

Hann hevur eisini starvast sum bilseljari, ferðaleiðari og lærari á Handilsskúlanum í Marknagili.

Síðan 1994 hevur familjan búð í Bømlo, har Jørgin rekur sítt egna virkið, Akva Trade AS.

Hann er samskipari hjá ferðavinnufelagnum í oynni og hevur fleiri álitisstørv innan mentunarlívið í Bømlo. Harafturat er hann nevndarformaður í feløgunum »Lift Up AS« og »Seilmaker Service AS«, sum bæði framleiða og selja aliútgerð, m. a. til Føroya.

Jørgin er giftur við Lis-Mariu Brimheim úr Havn. Tey eiga tey seks børn, sum øll búgva í Noregi.

**m.g.**



*Dagny Joensen hyggur í fyrsta Sosialin, sum varð prentaður á Argjum. Marner Simonsen og Hans Thomsen kaga eisini forvitnisliga í blaðið*




*Jørleif Hilduberg varð settur sum prentari á Sosialinum í 1982, og prentaði hann blaðið fram til 1999*



*Borðreitt varð við mati og drekka á hátíðardegnum. Á myndini Eiden Müller, Eydna Djurhuus, Atli Dam, Ingvør Nolsøe og Hans Thomsen*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum við gávum, telegrammum, blómum og uppringingum, við talum, sangum og á annan hátt vóru við til at gera gullbrúdleypsdagin 27. okt. 2001 so hugnaligan.

Tøkk øll somul.

Heilsan
**Rosmunda og Jacob Oluf**



Eiler Jakobsen, reiðari um svarkjaftin

# Trupulleikin er innahýsis hjá føroyingum



*Eiler Jacobsen, reiðari*

SVARTKJAFTUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

- Vit hava øll kort á hondini fyri at fáa eina góða svartkjaktaavtalu við okkara grannatjóðir. Svartkjafturin er hjá okkum megin partin av árinum og tí skulu vit ikki ganga undan við skerjingum, áðrenn ein endalig svartkjaftaavtala er fingin í lag. Trupulleikin við svartkjafti er nógv meira innanlendis hjá okkum sjálvum. Eg havi hoyrt, at ikki færri enn 19 svartkjaftaloyvi hanga í luftini hjá fiskimálaráðharranum og tað er ein stórur trupulleiki, sigur Eiler Jacobsen, reiðari.

- Tað er ikki pláss fyri nýggjum svarkjaftaloyvum í løtuni. Teir stóru svartkjaftatrolararnir skulu hava eini 60.000 tons í part fyri at standa seg. Tríggir teir størstu nótabátarnir veiddu tilsamans 180.000 tons í fjør. Verða hesi 19 loyvini givin, so verður ongin svartkjaftakvota nóg stór, sigur Eiler Jacobsen.

- Eg skilji heldur ikki, at skittfiskabátar í dag kunnu gera krav upp á svarkjaftin. Teir hava so avgjørt ikki nøkur søgulig rættindi. Teirra hjáveiða av svartkjafti var ongantíð størri enn 30 prosent. Hesir bátar fingu milliónir í endurgjaldi fyri at fara av Føroyagrunninum, tí teir høvdu so stóra hjáveiðu av hýsuyngli. Nú koma teir aftur úr Norðsjónum sum svartkjaftahetjur og krevja. Vit sum hava ligið í svartkjaftinum øll árini fáa stórar trupulleikar, verða ótálmað givin fleiri svartkjaftaloyvi, sigur Eiler Jacobsen.



# Krónborg seldi dýra sild

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Krúnborg seldi gott í Aalesund í gjár. Teir hava roynt við troli eftir Norðhavssild uttanfyri Aalesund og landaðu 600 tons. Teir fingu 5,61 n.kr fyri kiloið. Krúnborg seldi fyri 3,3 mió. N.kr.

Krúnborg fekk sildina við troli og teir høvdu stutt úti, bert tveir minuttir, so hálaður teir aftur og teir fingu 200 tons í hálinum.

Krúnborg eigur knappliga 5000 tons av Norðhavssild á í norskum sjógvi. 1800 tons kunnu teir royna við Aalesundsleiðina og restina longur norðuri. Sildin stendur djúpt og tað er ikki vanligt at royna eftir henni við troli. Skipari er Sámal Jacobsen, yngri.




## Statoil Føroyar
### søkir eftir rakstrarleiðara

**Til rakstrardeild okkara søkja vit eftir leiðara**

**Starvið**
Starvið umfatar handfaring av oljuúrdráttum, tað verið seg móttøku, goymslu og víðari flutning til brúkaran. Eisini umfatar starvið menning av deildini, soleiðis at brúkarin fær bestu tænastu skipaða eftir dagførdum mannagongdum.

**Høvuðsuppgávur**
- At skipa flutningin av oljuúrdráttum til viðskiftafólk okkara.
- At verða dagligur leiðari hjá starvsfólkum okkara á rakstrardeildini.
- At leggja til rættis innkeyp av oljuúrdráttum herundir avgreiðslu av tangaskipum.
- At samskipa arbeiðið á goymslum okkara.
- At gera mánaðaruppgerðir á goymslum okkara.
- At hava ábyrgdina av útreiðsluætlanum hjá rakstrardeildini.
- At hava ábyrgdina av, at allar ásettar rakstrar-, trygdar- og umhvørvisskipanir verða fylgdar.
- At útbúgva starvsfólk og menna verandi skipanir.

**Vit bjóða**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Møguleikar eru eisini at dagføra royndir á rakstrarstøðum hjá Statoil uttanfyri Føroyar og at luttaka á skeiðum innan samtakið.

**Førleiki**
Nýggi rakstrarleiðarin skal verða ágrýtin, framtakshugaður og duga væl at samstarva við viðskiftafólk og starvsfelagar.
Royndir sum leiðari, at nýta teldu og at handfara oljuúrdráttir geva fyrimun.

**Setanarviðurskiftir**
Rakstrarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til leiðslu felagsins.

Lønin verður sett eftir útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**P/f Statoil Føroyar**
**att. Niels Juel Nattestad,**
**Postboks 3098, Viðarnes,**
**FO-110 Tórshavn, innan 8. mars.**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Endamálið hjá Statoil Føroyar er at veita brúkarum kring landið oljuúrdráttir og aðrar vørur. Fyri Statoil Føroyar arbeiða uml. 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og bestu tænastu.
Umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.

STATOIL
- fyri viðskiftafólk okkara

petur & petur • +298 320870